**Í vikuni vandu Terji og Føstufressar fyri fyrstu ferð eini 10 ár. Tað svingaði beinanvegin hjá tónleikarunum, sum hava spælt saman, síðani teir vóru smádreingir**

FØSTUFRESSAR

*Eyðun Klakstein*



*– Plátan við Føstufressum var nakað heilt serligt. Tað var ein av teimum fyrstu ferðunum, at vit vóru í studio. Vit vandu dúgliga frammanundan, bæði heima í stovuni hjá Terja og í kjallaranum hjá Leivur og teimum, greiðir Rógvi á Rógvu frá*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Til dreymaland við Føstufressum

Tað var ein kanin, sum FUT dró upp úr hattinum, tá ið fyriskipararnir av ólavsøkukonsertini kunngjørdu, at Terji og Føstufressar fóru at spæla á konsertini.

Tiltikni bólkurin, sum ikki hevur verið á føroyskum palli í eini 10 ár, skuldi nú savnast aftur, og allir teir upprunaligu limirnir í bólkinum skuldu spæla við.

Hetta var ein rættiligur jokari fyri stóru konsertina, og tað er lítið at ivast í, at Føstufressar fara at lokka onnur enn bara tey yngstu á konsertina.

Hóskvøldið vandu Føstufressarnir saman aftur fyri fyrstu ferð í nógv ár, og tað gekk væl.

– Tað var stuttligt at vera saman aftur, og tað svingaði beinanvegin hjá okkum, sigur Rógvi á Rógvu, sum er trummuspælari í bólkinum.

### Spæla alla plátuna

Tað var í 1990, at plátan við Terja og Føstufressum kom út, og hóast móttøkan í byrjanini ikki var nakað serligt, so vaks hendan plátan seg stóra og sterka í árunum, sum komu.

– Hetta er tann fløgan, sum hevur havt størst týdning fyri meg, og sum eg havi verið mest nøgdur við, sigur sangarin Terji Rasmussen um útgávuna, sum hann kallar sítt høvuðsverk.

Teir frálíku sangirnir á hesi útgávu hava staðið ímóti tíðarinnar tonn, og teir standa eins sterkir í dag, sum teir gjørdu fyri 10 árum síðani og meira.

Á ólavsøkukonsertini fer bólkurin at spæla allar sangirnar, sum eru á plátuni, og tað verður helst tað reina krás hjá teimum mongu, sum hava tikið sangirnar til sín.

### Intens tíð

Flestu av tónleikarunum í Føstufressum hava spælt saman, síðani teir vóru smádreingir. Teir vuksu upp í sama grannalagi í Havnini, og tá ið teir vóru ungir funnu teir saman í tónleikabólkar.

– Plátan við Føstufressum var nakað heilt serligt. Tað var ein av teimum fyrstu ferðunum, at vit vóru í studio. Vit vandu dúgliga frammanundan, bæði heima í stovuni hjá Terja og í kjallaranum hjá Leivur og teimum, greiðir Rógvi frá.

– Vit hildu okkum vera sera seriøsar, og eg minnist eisini tíðina sum intensa og gevandi.

Úrslitið av nógva spælinum finniast á útgávuni hjá Terja og Føstufressum, og við sangum sum Lívið er okkara gáta og Ljóðmynd spældi bólkurin seg inn í meira enn stutttíðarminnið hjá føroyingum.

– Eg ivist ikki í, at sangirnir fara at rigga væl á ólavsøkukonsertini. Fleiri av teimum eru kendir millum nógv fólk, sigur Rógvi.

Hann hevur spælt í ymiskum bólkum gjøgnum árini, og hann hevur onkuntíð spælt onkrar av sangunum av útgávuni hjá Føstufressum, men langt frá allar, og tað verður fyrstu ferð í 10 ár, at upprunamanningin fer at spæla allar teir gomlu sangirnar.



*Leivur Thomsen stendur fyri frálíka gittarspælinum í Føstufressum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Onkur broyting

Á ólavsøkukonsertini fara tónleikararnir, sum spældu sangirnar inn í studio, eisini at spæla. Onkur smávegis broyting er, men tað er ikki nakað, sum fer at merkja heildina.

Holgar Lauman spældi saxofon á útgávuni, men hann verður ikki við hesaferð. Ístaðin fyri Mortan Zachariasen at blása í hornið.

Rúna á Heygum sang helst vakrasta sangin á útgávuni – Á ferð til Dreymaland – men hon verður heldur ikki við hesaferð.

Terji Rasmussen er sangari í bólkinum, meðan Eyðun Nolsøe syngur kór saman við honum.

Føstufressar fara at spæla seint í ólavsøkukonsertini, og so kann ólavsøkunátt haldast við hesum frálíka bólki.

Kanska er tað ein lítil ferð til dreymaland fyri mong.

## Føstufressar

**Terji Rasmussen - sang**
**Eyðun Nolsøe - gittar**
**Arnold Ludvig - bass**
**Leivur Thomsen - gittar**
**Rógvi á Rógvu - trummur**
**Magnus Johannesen - ljómborð**
**Mortan Zachariasen - saxofon**

Terji og Føstufressar hava staðið fyri einari útgávu, og hóast tað kann tykjast avmarkað í stóra føroyska tónleikalandslagnum, so eru Føstufressar nakað serligt. Útgávan frá 1990 er kanska besta føroyska plátan nakrantíð.

Føstufressar hava ikki spælt saman við upprunaligu manningini í eini 10 ár, men nú fara teir at royna seg aftur.

Fleiri av tónleikarunum hava búð uttanlands, men flestu teirra hava nú leitað heimaftur.



# Róin við donskum bólki

**Róin Siggertsson er virkin tónleikari í Danmark, men á ólavsøkukonsertini ber aftur til at hoyra hann á føroyskum palli**

roWan

*Eyðun Klakstein*

Føroyski tónleikarin og tónasmiðurin Róin Siggertsson hevur búð í Danmark í fleiri ár, men hann hevur hann verið virkin tónleikari, og av og á hevur hann verið heima og spælt.

Róin var við á ólavsøkukonsertini í fjør, og hann kemur aftur heim í ár at spæla sín melodiøsa og stundum funkuta popptónleik.

Við sær í bólkinum hevur Róin dugnaligar danskar tónleikarar, sum fara at spæla saman við honum.

### Gjørdi vart við seg

Róin Siggertsen var fyri einum ári síðani nógv frammi í Danmark, tí hann var ein av teimum, sum gjørdi vart við seg í sendirøðini Rock Idoler hjá TV3. Sendingin var skipað sum ein kapping millum tónleikarar fyri at koma við í ein bólk, og Róin var við heilt til endans, tá ið valið stóð ímillum hann og ein danskar sangara.

Valið fall á danska sangaran, men tá hevði Róin longu gjørt vart við sínar tónleikaligu dygdir.

Umframt at skriva tónleik fæst Róin eisini við at framleiða sín egna tónleik og tónleik hjá øðrum.

Fyri einum ári síðani var roWan, sum hann kallar seg á palli, ein frískt innslag á ólavsøkukonsertini, og nú fáa føroyingar so enn eina smakkiroynd av tónleikinum hjá honum.



*Róin Siggertsson – ella roWan, sum hann kallar seg á pallinum – fer at spæla á ólavsøkukonsertini sunnukvøldið*

## Apurnar leggja fyri

Tað verður bólkurin Monkey Mongolia, sum fer at leggja fyri á ársins ólavsøkukonsert.

Bólkurin er rímiliga ókendur, men teir hava longu einaferð gjørt vart við seg. Teir vunnu nevniliga Pop Top kappingina í ár, og so er tað gamal siður, at hesin bólkur sleppur at spæla fyrst á ólavsøkukonsertini sama ár.

Bólkurin er mannaður við ungum tónleikarum úr høvuðsstaðnum.

## Rás 2 ætlar at vera við

Rás 2 brynjar seg til at senda beinleiðis frá ólavsøkukonsertini. Ætlanin er at senda tónleik av pallinum, og fólk hjá rásini fara eisini at ganga millum fólk og millum tónleikarar fyri at gera samrøður.

Tað hevur ikki verið vanligt, at ólavsøkukonsertin er blivin varpað út til Føroya fólk á hendan hátt, men gongst tað sum ætlað, so fer Rás 2 at syrgja fyri hesum.

Tá ið vit tosaðu við tey í gjár var bara eitt ivamál um sendingina, og tað var, um neyðugu linjurnar kundu leggjast til sendingina. Tað var tó mett, at hetta fór at koma upp á pláss.

Umframt tónleikin og samrøður á staðnum, hevur Rás 2 eisini gjørt innsløg um ólavsøkukonsertina, sum verða send sunnukvøldið.

Ólavsøkukonsertin byrjar klokkan 21.00 og heldur fram til kl. 04.00 mánamorgunin.

**ek**



*Rás 2 ætlar sær at senda, tá ið Déjá Vu og hinir 9 bólkarnir fara at spæla í Kommunuskúlagarðinum sunnukvøldið*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Studiotónleikari farin solo

**Hann hevur gjøgnum árini spælt saman við eini ørgrynnu av donskum og útlendskum bólkum, men ikki fyrr enn í fjør gjørdi Troels Skovgaard sína egnu útgávu**

SKOVGAARD

*Eyðun Klakstein*

Einasta útlendska navnið á ólavsøkuskonsertini er Troels Skovgaard.

Talan er um dugnaligan danskan gittarspælara, sum er kendur sum studio- og konserttónleikari hjá ymsum bólkum og solistum.

Hann vaks upp í Aalborg í sjeytiárunum, og har spældi hann eisini í teimum fyrstu bólkunum. Fyri tað mesta var talan um bólkar, sum spældu covertónleik.

Seinni fekk útbúgving á klassiskum konservatorii, og í 1983 flutti hann til Keypmannahavn at búgva.

Hann fann hann saman við øðrum tónleikarum, og teir høvdu bólkin Bamboo Brothers.

### Endaði solo

Troels fekk alt fleiri uppgávur í studio og til konsertir við øðrum bólkum, og burtur úr stóru rúgvuni av nøvnum, sum hann hevur spælt saman við, kunnu vit nevna Hanne Boel, Tamra Rosanes, Savage Rose, Jørgen Emborg og Jette Torp.

Í 1995 góvust teir at spæla í Bamboo Brothers, og Troels arbeiddi víðari við sínum egnum projektum. Hann fór at framleiða tónleik og hevur millum annað gjørt tónleik saman við abbadóttir Regin Dahl, sum eitur Laura Illeborg.

Í fjør gjørdi hann sína fyrstu solofløgu, og á hesi útgávu spælir hann bluestónleik. Nú hevur hann ein bólk, sum hann spælir saman við, og tað verður hesin bólkur, sum fer at spæla á ólavsøkukonsertini.